# Súni gjørdi vart við seg

**Týskvøldið slapp Súni Olsen fyri fyrstu ferð at royna seg á besta liðnum hjá AaB, sum leikti venjingardysti móti Ørgryte úr bestu svensku deildini.**

ÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dysturin var leiktur í Svøríki framman fyri eini 500 áskoðarum, og Súni Olsen var á bonkinum, tá ið dysturin var bríkslaður í gongd.

### Rakti trýkantin

Gøtumaðurin slapp tó á vøllin, longu tá ið ein hálvur tími var leiktur. Henda tíman, ið Súni var á vøllinum, royndi hann seg á sentrala miðvøllinum, og sum skilst á heimasíðuni hjá AaB, www.aabsport.dk, stóð føroyski landsliðsmaðurin seg væl.

Heimasíðan skrivar millum annað, at Súni Olsen fekk víst, at hann væl megnar at verða við á hægsta støði, og gøtumaðurin hevði eisini eitt drønandi langskot á sjálvan trýkantin, og tað var um reppið, at svenski AaB-leikarin, Martin Ericsson, fekk beint returin í málið.

AaB vann dystin 2-1.

# B36 kann skriva søgu

**Árstalsfelagið úr Havn skal í kvøld royna seg í spennandi UEFA-Cup dysti í Vestmannaoyggjunum í Íslandi. Hetta er kanska besti møguleikin hjá einum føroyskum liði nakrantíð at spæla seg víðari í europeiskari kapping.**

UEFA-CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyri ein av leikarunum hjá B36, Allan Mørkøre, er talan eisini um ein heilt serligan dyst, tí mótstøðuliðið hjá B36 er ÍBV, sum Allan sjálvur áður hevur spælt við fyri nøkrum árum síðani.

Nógv er tó skift út í hópinum hjá ÍBV, síðani Allan Mørkøre vendi heim aftur til Føroya, og í dag eru ikki meiri enn einir fýra ella fimm eftir av teimum, sum vóru við í hópinum, tá ið klaksvíkingurin var við.

### Hava fyrireikað seg væl

Í fjør fekk B36 skotið fyri bógvin, at teir ikki tóku UEFA-Cup dystirnar í nóg stórum álvara, tá ið teir eftir greiðan ósigur á heimavølli móti lettiska Metalurgs, bíðaðu við at fara til returdystin til á sjálvum leikdegnum, og síðani taptu 8-1 í Letlandi.

Í ár hava havnarmenninir tó gjørt nógv fyri at fyrireika seg so væl sum gjørligt, og ein orsøk er ivaleyst hon, at møguleikin fyri at spæla seg víðari er rættuliga góður í ár.

Eftir 2-0 sigurin á KÍ í Formuladeildini leygardagin, gekk leiðin hjá B36-hópinum vestur í Vágar, og kósin var sett móti Íslandi. Hópurin hjá B36 hevur verið í Vestmannaoyggjunum síðani seint leygarkvøldið, og teir lata sera væl at umstøðunum.

Teir hava vant hvønn dag í Íslandi, og onkran dagin hava eisini tvær venjingar verið á skránni.

Sunnudagin var B36-hópurin og hugdi at ÍBV, sum á heimavølli hevði vitjan av Fram í Landsbankadeildini. ÍBV vann dystin 2-0, men avrikið hjá íslendingunum var ikki nakað, sum skapti ótta millum havnarmenninar.

ÍBV liggur í niðara enda av stigatalvuni í heimligu Landsbankadeildini, og havandi í huga, at munurin millum føroyskan og íslendskan fótbólt ikki er so øgiliga stórur, er tað ikki heilt ógjørligt, at B36 kann skriva søgu og spæla seg víðari.

Allir mans hjá B36 eru tøkir til dystin í kvøld. Einasta undantakið er verjuleikarin, Herbert í Lon Jacobsen, sum hevur ein skaða í fótinum, og tá ið vit tosaðu til Íslands mikudagin, var tað ivasamt, um hann fór at verða klárur til dystin.



*Útlitini hjá Allan Mørkøre og B36 fyri at spæla seg víðari í UEFA-Cup kappingini eru góð, tá ið teir í kvøld skulu spæla móti gamla liðnum hjá Allani, ÍBV úr Vestmannaoyggjunum, tí íslendska liðið er í løtuni millum tey veikaru í íslendsku kappingini.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# NSÍ fær tað trupult

**Runavíkingar fáa tað ivaleyst trupult, tá ið teir í kvøld taka ímóti lettiska Metalurgs á Svangaskarði í UEFA-Cup kappingini.**

UEFA-CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Royndirnar hjá Jens Martini Knudsen komu óivað at hava nógv at siga, tí væntandi verður NSÍ sett undir stórt trýst av lettiska Metalurgs, sum vitjar á Svangaskarði í kvøld.*

*savnsmynd*

Metalurgs vitjaði eisini í Føroyum í fjør, tá ið teir vunnu 3-1 á B36 á Tórsvølli, og síðani runnu havnarliðið um koll og vunnu heili 8-1 í Letlandi.

### Ivi um Christian Høgna

Sunnudagin vann NSÍ 3-1 á VB í Runavík, og tá gjørdi landsliðsmaðurin, Christian Høgni Jacobsen, øll trý málini hjá NSÍ. Tíverri fyri runavíkingar fekk Christian Høgni ein snudd í knæið í tí dystinum, sum ger, at vandamikli framherjin er ivasamur til dystin í kvøld. Um Christian Høgni ikki verður klárur, er tað ein dyggur smeitur fyri NSÍ, tí at hann hevur royndir frá altjóða dysti, og somuleiðis er hann rættuliga vanur við at spæla á grasi eftir fleiri ár í donskum fótbólti. Harumframt hevur Christian Høgni ongantíð áður spælt evropeiskan dyst fyri NSÍ, og nógv verður gjørt í eini roynd at fáa hann kláran til dystin móti Metalurgs.

Hinvegin kunnu tey í Runavík fegnast um, at nigerianski framherjin, Ike, nú er fullkomiliga klárur aftur, eftir at hann eisini hevur verið uttan fyri við skaða. Teir báðir Sjúrður Jacobsen og Gert Langgaard eru tó framvegis skaddir og verða ikki við.

Trygvi Mortensen sigur, at teir vita, at lettiska liðið er ógvuliga sterkt, og at talan verður um eina trupla uppgávu hjá runavíkingum.

- Vit vita, at teir eru skjótir og teknískt ógvuliga væl fyri, og vit kunnu vænta at verða trýstir. Í fjør tók eg mær av B68, sum spældi UEFA-Cup móti einum øðrum lettiskum liði, Ventspils, og eyðkenni fyri teir var, at teir spældu ferðmiklan fótbólt við nógvum langum skfitum, sigur Trygvi Mortensen.

NSÍ-venjarin heldur, at tað er ógvuliga umráðandi hjá runavíkingum, at teir standa væl á vøllinum, og at teir eru klárir, tá ið dysturin verður bríksladur í gongd.

Dysturin millum NSÍ og Metalurgs verður á Svangaskarði í kvøld klokkan 18.

## Útsettur dystur í Gøtu í kvøld

Í kvøld verður útsetti dysturin í Formuladeildini millum GÍ og TB leiktur í Gøtu. Dysturin skuldi verið leiktur 3. juli, men tá bleiv hann avlýstur, tí at vindurin var so nógvur í Gøtu.

GÍ og TB hava dystast einaferð áður í ár, og tað var á Sevmýri 16. mai. Tann dystin vann TB greitt 3-0.

Dysturin í kvøld er eisini sermerktur á tann hátt, at hetta er fyrsti dysturin hjá GÍ, síðani liðskiparin og stóra stjørnan á liðnum, Súni Olsen, fór til danska superligafelagið AaB, og spennandi verður at síggja, hvussu tað fer at ganga hjá gøtumonnum uttan landsliðsmannin.

Bæði liðini hava harðligani brúk fyri einum sigri, og tí kann væntast, at menn fara at leggja nógv fyri í strembanini eftir sigrinum.

Dysturin í kvøld verður leiktur í Gøtu klokkan 17.30.

**tn**